# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 08.06.2022 |
| Mál nr.: | 22/07921 |
| Málsviðgjørt: | MFR |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um virking av alifiski í Suðuroy**
(Virking í Suðuroy)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 90 frá 27. juni 2018 um virking av alifiski í Suðuroy, verður § 2 orðað soleiðis:

*"***§ 2.** Laksur frá alibrúkum í Suðuroy skal verða virkaður í Suðuroy.

*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 er loyvt at flyta laks frá alibrúkum í Suðuroy til virkingar norðanfyri treytað av, at í minsta lagi sama nøgd verður flutt suður aftur at virka í sama álmanakkaári.

*Stk. 3.* Tann, sum hevur aliloyvi, skal tryggja og skjalprógva, at ásetingarnar í stk. 1-2 eru loknar.*"*

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 8. juni 2022

**Magnus Rasmussen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen